## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, um kvøldið upp í hvassan vind. Sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátaslettingur og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og útnyrðingi og stundum regn ella vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Skrið ella stormur av útnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

Dong brúkt 100 mill. kr. á Atlantsmótinum:

# Jarðfrøðin er sera torskild

OLJULEITING
*Jan Müller*

Danska oljufelagið Dong var við í tí seinastu boringini við markið og hevur føroyska ævintýrið á Atlantsmótinum higartil kostað felagnum 100 mill. kr. Í farnu viku vitjaðu tveir av stjórunum hjá Dong í Føroyum, Hans Jørgen Rasmussen og Søren Gath Hansen. – Vit vilja fegnir vísa flaggið, soleiðis at tað ikki sýnist sum tað bara er Amerada Hess, ið er við í arbeiðinum. Vit vilja fegnir, uttan mun til positiv ella negativ úrslit, gera greitt, at vit eygleiða økið við langsiktaðum áhuga sigur Søren Gath Hansen. Hann sigur, at hesin seinastu brunnurin vísir, at økið er sera kompliserað at arbeiða í, og at tað krevst nógv meira arbeiði, áðrenn nakað endaligt kann sigast. Tað fevnir bæði um Marjunbrunnin og henda seinasta. Men tað at kolvetni eru staðfest í báðum hesum brunnum er sera positivt og tað gevur grundarlag fyri víðari arbeiði. Søren Gath Hansen sigur, at tað sjálvandi hevði verið betri, um teir høvdu kunnað testað brunnin, men tað varð so ikki mett ráðiligt, nú ein ikki kann siga, um talan er um ein stóran samanhangandi struktur. Tað, sum Dongstjórin sær sum negativt við tí seinasta brunninum, er, at tað kemur at leingja um tilgongdina. Meiri tíð skal brúkast til at skilja ta torskyldu jarðfrøðina.



*Søren Gath Hansen, leitistjóri hjá Dong ikki ovurfegin um úrslitið av tí seinastu boringini. Hon kann gera, at tilgongdin fer at taka longri tíð enn vónað*

*Mynd Dongblaðið*

West Navion er nú farið undir at bora Cambo-brunnum, sum liggur longur norðuri, í bretskum øki men ikki so langt frá markinum. Dong er við saman við Amerada Hess, ChevronTexaco og OMV. Úrslitið av hesi boringin hevur eisini áhuga fyri føroyaøkið. Dong hevur annars roynt at flyta seg út um danska partin av Norðsjónum og hevur í seinastuni gjørt íløgur í norskum øki eisini, umframt at vera við í Føroyum og í Grønlandi.




*Kortið vísir okkum Cambo-brunnin, sum nú verður boraður. Hann kann fáa stóran týdning fyri Føroyaøkið eisini og her m.a. Agip, sum hevur 9 ára loyvi í grannalagnum.*

*Kort Dongblaðið*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | 6 |
| Halifax | 13 |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 8 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | – |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 20 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 35 |
| Sydney | 17 |
| New York | 14 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 967 hPa vestan fyri Biscaya fer móti Onglandi og grynnist nakað. Eitt hátrýst, 1041 hPa yvir Grønlandi stendur í stað og viknar nakað.




Djúpa lágtrýstið yvir Onglandi fer móti havinum millum Hetland og Suður-Noreg. Hátrýstið yvir Grønlandi viknar nakað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/10 kl. 06⁰⁰– 21/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,8°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,8 mm – mált frá 20/10 kl. 06⁰⁰– 21/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 39,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni
29. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. okt. | 08.02 | 20.20 | 07.02 | 19.20 | 07.17 | 19.35 | 10.02 | 22.20 | 11.02 | 23.20 | 06.17 | 18.35 | 05.17 | 17.35 | 08.17 | 20.35 | 09.17 | 21.35 | 07.47 | 20.05 | 09.02 | 21.20 |
| 23. okt. | 08.38 | 20.58 | 07.38 | 19.58 | 07.53 | 20.13 | 10.38 | 22.58 | 11.38 | 23.58 | 06.53 | 19.13 | 05.53 | 18.13 | 08.53 | 21.13 | 09.53 | 22.13 | 08.23 | 20.43 | 09.38 | 21.58 |
| 24. okt. | 09.19 | 21.40 | 08.19 | 20.40 | 08.34 | 20.55 | 11.19 | 23.40 | — | 12.19 | 07.34 | 19.55 | 06.34 | 18.55 | 09.34 | 21.55 | 10.34 | 22.55 | 09.04 | 21.25 | 10.19 | 22.40 |
| 25. okt. | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |


BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 · FO-188 Hoyvík · Tórshavn

-skjótt fast Internet...
úr 275,- mdr.
el & tele


5 707265 100029 >